# ALNETÚTGÁVA Á OVASTA POPPTINDINUM

Gnarls Barkley skrivar hesa vikuna tónleikasøgu. Lagið Grazy liggur hesa vikuna ovast á Top Of The Pops í Bretlandi. Hetta er fyrstu ferð, at eitt lag, ið einans kann takast niður av alnetinum, er endað ovast á bretska hittlistanum.
Lagið er nústaðni mánadagin komið út á fløgu, so øll sølan seinastu vikuna var umvegis altnetið. Fyri einum mánað síðan var reglugerðin fyri hittlistan broytt, soleiðis at niðurtøka av alnetinum telur við, um lagið kemur á fløgu í mesta lagi eina viku aftan á.
Sambært The Guardian er lagið tikið lógliga niður av alnetinum 31.000 ferðir seinastu vikuna.
Hendingin staðfestir enn einaferð, at niðurtøka av tónleiki av alnetinum er vorðin ein sera týdningarmikil marknaður.




Við 31.000 niðurtøkum á alnetinum liggur lagið Crazy ovast á bretska hittlistanum.



Gnars Barkley er samstarvið millum hipp hopp framleiðaran Danger Mouse og sangaran Cee-Lo. (mynd: myspace.com/gnarlsbarkley)

## HITLIST

### 15 tær bestu (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 2 | Pink | Stupid Girls |
| 3 | Høgni Lisberg | Just Dig |
| 4 | The Pussycat Dolls | Beep |
| 5 | Makrel | Filthy Tongue |
| 6 | Madonna | Sorry |
| 7 | Robbie Williams | Advertising Space |
| 8 | Black Eyed Peas | Pump it |
| 9 | Kent | Dom som försvann |
| 10 | Poppkorn | Droymi Mitt Um Dagin |
| 11 | Petur Pólsson | Fremmandur |
| 12 | Villmenn | Cyberspace |
| 13 | Pearl Jam | World Wide Suicide |
| 14 | Joey Moe | My Last Serenade |
| 15 | Bobby Sinclair | Love Generation |

### Tjeklisten (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Anden | FAQ |
| 2 | Spleen United | Spleen United |
| 3 | TV-2 | Sporløs |
| 4 | UFO Yepha | Op med håret |
| 5 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 6 | Pink | Stupid Girls |
| 7 | Magtens Korridorer | Nordhavn Station |
| 8 | Peter Sommer | Man hamrer løs på åben en dør |
| 9 | Tina Dickow | Warm Sand |
| 10 | Madonna | Sorry |
| 11 | The Streets | When You Wasn't Famous |
| 12 | Jokeren ft. Mass | Godt Taget |
| 13 | Morrissey | You Have Killed Me |
| 14 | Laleh | Live Tormorrow |
| 15 | Mew | Special |
| 16 | Flipside ft. Piper | Happy Birthday |
| 17 | Kashmir | The Cynic |
| 18 | Arctic Monkeys | When The Sun Goes Down |
| 19 | Sugababes | Ugly |
| 20 | Veto | We are Not Your Friends |

### Top of the Pops (BBC)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Gnarls Barkley | Grazy |
| 2 | Ne-Yo | So Sick |
| 3 | Morrissey | You Have Killed Me |
| 4 | Embrace | Nature's Law |
| 5 | Orson | No Tomorrow |
| 6 | The Kooks | Naive |
| 7 | Black Eyed Peas | Pump It |
| 8 | The Streets | When You Wasn't Famous |
| 9 | Pussycat Dolls ft. Will I Am | Beep |
| 10 | Pink | Stupid Girls |
| 11 | Corinne Bailey Rae | Put Your Records on |
| 12 | Depeche Mode | Suffer Well |
| 13 | Sean Paul | Temperature |
| 14 | Kanye West ft. Lupe Fiasco | Touch The Sky |
| 15 | The Feeling | Sewn |
| 16 | Sugababes | Red Dress |
| 17 | Michael Jackson | The Way You Make Me Feel |
| 18 | Chico | It's Chico Time |
| 19 | Mary J Blige & U2 | One |
| 20 | Madonna | Sorry |

### Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Daniel Powter | Bad Day |
| 2 | Sean Paul | Temperature |
| 3 | Ne-Yo | So Sick |
| 4 | James Blunt | You're Beautiful |
| 5 | Mary J. Blige | Be Without You |
| 6 | Natasha Bedingfield | Unwritten |
| 7 | Dem Franchize Boys og onnur | Lean Wit It, Rock Wit it |
| 8 | T-Pain ft. Mike Jones | I'm N Luv |
| 9 | Bubba Sparxxx og onnur | Ms. New Booty |
| 10 | Chris Brown | Yo(Excuse Me Miss) |
| 11 | Cascada | Everytime We Touch |
| 12 | Beyonce ft. Slim Thug | Check On It |
| 13 | Pussycat Dolls ft. Will I Am | Beep |
| 14 | Nelly og onnur | Grillz |
| 15 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 16 | The All-American Rejects | Move Along |
| 17 | Busta Rhymes | Touch It |
| 18 | Eminem ft. Nate Dogg | Shake That |
| 19 | Keysha Cole | Love |
| 20 | Fall Out Boy | Dance, Dance |

sound



Cameron Diaz sleppur sjálv at avgera, hvør sleppur og hvør ikki sleppur at síggja hennara beru bringu.(mynd: scanpix.dk)

# CAMERON DIAZ VANN RÆTTARMÁL

Heimurin sleppur ikki at síggja beru bringuna hjá amerikansku sjónleikarakvinnuni Cameron Diaz. Hetta avgjørdi rætturin fríggjadagin. Diaz vann rættarmálið ímóti myndamanninum John Rutter, ið fyri 14 árum síðan tók myndir og videoupptøkur av tí ungu Cameron Diaz við berari bringu. Rutter tók myndirnar av Diaz, áðrenn hon varð kend. Tá hon seinni gjørdist ein stjørna, royndi John Rutter at kroysta Diaz til at gjalda 18 milliónir kr. fyri myndirnar. Diaz svaraði aftur við at leggja sak ímóti myndamanninum. John Rutter situr nú í fongsli m.a. fyri at hava logið fyri rættinum. Harumframt hevur hann ikki loyvi at almannakunngerða myndirnar og skal gjalda Diaz endurgjald, skrivar Verdens Gang.

# BRITNEY SPEARS ER HARDCORE LESBISK



Britney Spears skelkar enn einaferð USA, í nýggjum pørtum av sjónvarpsrøðini Will & Grace spælir songkvinna ein hardcore lesbiskur sjónvarpsvertur, og við útsøgnum sum "Whatever you got, I'll eat it, snort it or ride it, baby". Hevur tann einaferð so óseka og fitta ungmoyin enn einaferð megnað at skelkað borgarliga partin av amerikanska fólkinum, skrivar eb.dk. Britney Spears er í sjónvarpsrøðini lesbiska Peg. Peg er saman við Jack vertur í talk showinum Jack Talk, og vísir sambært people.com atburð, ið fer at skelka nógvar trúgvar fjepparar.
Hetta er fyrstu ferð, síðan Britney gjørdist mamma, at hon spælir leiklut í sjónvarpi ella filmi.



# NÓGVIR MENN VILJA Í SONG VIÐ KELLY OSBOURNE

Veruleikasjónvarpsstjørnan Kelly Osbourne hevur tapt seg 15 kilo seinastu tíðina, og sambært eb.dk, hevur hetta gjørt undurverk fyri hennar kynslív. Hon er vorðin sera vælumtókt millum teir ungu og ríku. Sjálv sigur Kelly, at henni dámar væl henda lívstílin við skjótum einaferðsamlegum við kúllaligum monnum, serliga tí hetta veruliga øsir mammu hennara.
Kelly sigur, at hon eisini hevur varhugan av, at orsøkin til, at summir av teimum ríku ungu monnum vilja hava hana við sær heim í song, er tí teir vilja skelka foreldur síni.